# Barnaprix í Havn leygarkvøldið



**Leygarkvøldið verður Nósa Barnaprix aftur á skránni – hesaferð verður tað 2. innleiðandi umfarið fyri Havnina**

BARNAPRIX
*Tíðindaskriv*

Leygakvøldið komandi kl 19 verður 2. innleiðandi umfarið í Nósabarnaprix2002 fyri Havnina.

Áhugin er stórur fyri tiltakinum, og er aftur fullteknað til hetta umfarið, sum verður í Badmintonhøllini, og sum vant eru tað tey bæði, Angela og Baby James, sum eru frásøgufólk.

Seinni verður so vinnarin kosin, sum skal vera við í stóru finaluni tann 9. november í høllini á Kambsdali. Fyrireikararnir hava tosað við nøkur av børnunum, sum skulu á pallin leygarkvøldið, og tey siga seg verða sera spent. Summi av teimum hava vant leingi saman við dansigentum og kórsangarum, og tey siga, at tey vilja geva áskoðarafjøldini eitt »show«, sum tey ikki hava sæð áður.



# DJ Show í Badmintonhøllini í Havn

DANSUR
*Tíðindaskriv*

Leygarkvøldið 5. oktoner kl. 23 verður eitt stórt DJ-Show í Badmintonhøllini.

– Skal eitt tílíkt tiltak verða fullkomið, má man hava ein góðan DJ. Og sjálvandi er tað Mr. Dj-COOL »himself«, sum kemur at standa fyri tónleikinum, siga fyrireikararnir.

Hann er sera kendur um alt landið fyri at kunna seta lív í, so neyvan má tað vera øðrvísi hesaferð.

Fyrireikararnir siga, at bussar koyra úr Eysturoynni í sambandi við tiltakið.

# Matiné við trimum unglingabólkum



**Leygardagin 5. oktober kl. 11.30 verður matiné i Havnar kirkju. Hesa ferð við trimum unglingabólkum frá Tórshavnar Musikkskúla**

MATINÉ
*Havnar kirkja*

Floytubólkurin er bólkur við eitt sindur á leið komnum næmingum, sum hava luttikið við ymisk almenn høvi - eitt nú seinast til handanina av M.A. Jacobsens virðislønum. Í framtíðini er ætlanin, at bólkurin skal vera meira virkin og spæla til konsertir. Leiðsla: Andrea Heindriksdóttir.

**Guitarbólkurin**

Fyri tveimum árum síðani flutti Ólavur Jakobsen, guitaristur til Føroyar, og síðani tá hava guitarnæmingar hjá honum luttikið á tí árliga guitarvikuskiftinum og annars spælt konsertir.

Føroya Klarinettorkestur er mest etableraði bólkurin. Tey vóru í summar ein væleydnaðan konserttúr í Bergen. Tað er Peder Riis-Jensen, sum setti bólkin saman, og er javnan boð eftir teimum at spæla við ymisk høvi.

# Mikkjal er umbiðin

**Nýggi gittarspælarin í Kjølum hevur fingið fleiri tilboð um at koma upp í bólkar, men næsta hálva árið ætlar hann at brúka alla sína tónleikaliga orku í Kjølum**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Mikkjal Hvannastein telist millum teir bestu gittarspælararnar her á landi, og síðani hann fór burtur úr gospelbólkinum I AM, hevur hann fingið fleiri tilboð um at koma upp í aðrar bólkar.

Hann hevur valt at taka av kjansinum í Kjølum, sum ætlar sær at spæla fram til jóla.

– Nú ætli eg mær at leggja alla orku í Kjølar næstu mánaðirnar, men eg rokni við, at eg fari í gongd í okkurt annað í februar, um vit ikki framvegis spæla í Kjølum, sigur Mikkjal.

Hann er fallin væl til í Kjølum, har hann spælir saman við Signar í Homrum, Henning Nicodemussen og Jens Tummasi Ness.

– Teir eru nakrar framúr góðir, festligir og seriøsir tónleikarar, og saman við teimum havi eg møguleikan at spæla nakað av tí, sum mær dámar best. Vit spæla sera ymiskan tónleik, og vit hava eisini jammað okkurt stykki, sum eg havi gjørt, sigur Mikkjal.





# Karsten virkandi løgmaður

**Fyrrverandi politiovastin í Klaksvík hevur seinatu dagarnar verið virkandi løgmaður**

STARV
*Heri á Rógvi*

Onkur skal stýra føroysku skútuni. Til hesa uppgávuna hava vit landsstýrismenninar, sum hvør sær umsita ein part av landsins áhugamálum.

Fíggjarmálini umsitur Karsten Hansen, og tað hevur hann gjørt nú síðani 1998, tá hann fór í farloyvi sum politiovasti í Klaksvík, og legði leiðina til Argir, har hann skuldi stjórnað búskapinum.

Seinastu dagarnar hevur hann stjórnað øllum landinum. Tómligt hevur verið í landsstýrinum. Løgmaður hevur verið í Danmark í sambandi við setanina av Fólkatinginum. Varaløgmaður, Høgni Hoydal, er eisini staddur í Danmark. Eyðun Elttør, sum er næstu í røðini, er farin til Skotlands. Hetta merkir so, at nýggjur á ovastu rók í Føroyum er 58 ára gamli Karsten Hansen.

Glæstritíðin á ovastu rók verður tó stutt, tí bæði løgmaður og varaløgmaður eru skjótt aftur á klettinum og skumpa harvið Karsten av rókini.

Sjálvur sigur Karsten skemtandi, at tað einasta, hann higartil hevur merkt til starvið, er, at hann skuldi á fjall týsdagin, men kundi ikki fara orsakað av arbeiðinum.



*Karsten Hansen hevur seinastu dagarnar verið virkandi løgmaður í Føroyum*




